


**Nr. 3** ***29. januar 2023*** **83. árg.**

# Var hetta bara av tilvild?

Ein norskur matrósur, sum fyri 21 árum síðani var farin heimanífrá, og 16 tey síðstu árini ikki hevði skrivað til mammu sína, gekk og válaði jólamorgun illa hýrdur niðri á havnarlagnum í Cardiff í Onglandi. Hann kom fram við einari kirkju, og sangurin freistaði hann at fara inn.

Eftir prædikuna segði prestur, at í morgin fór veitsla at vera í kirkjuni, og hann bjóðaði blídliga øllum at koma. Matrósurin møtti eisini til ásettu tíðina. Við inngongdina fekk hann eitt atgongumerki. Á tí stóð talið 400. Seinni fekk hann eina gávu, sum var eitt bundið hálsturriklæði, sum eisini hevði nummarið 400. Hann var ikki serliga glaður fyri gávuna, og hann hugdi heldur ikki gjøllari at henni. Men áðrenn hann fór í koyggjuna á kvøldi, tók hann hálsturriklæðið fyri gjøllari at hyggja at tí.

Eitt bræv var fest upp í tað, og á brævbjálvanum stóð: Til tann matrósin, sum fær hesa gávu.“ Hann læt brævið upp, og ein blídlig heilsan stóð í tí frá henni, sum hevði bundið og givið hesa gávu. „Eg eri,“ stóð víðari, „70 ára gomul, og eg havi tríggjar synir á sjónum. Ein teirra hevur ikki skrivað til mín í 16 ár – eg veit einki um hann.“

Niðriundir stóð undirskriftin – og hvør dugir at ímynda sær bilsnið hjá matrósinum? Tí har stóð navnið á mammu hansara!

Hann hevði enn 27 pund til góðar av hýruni. Hann fekk hýruna útgoldna, gjørdi seg lidnan og fór við fyrsta dampskipi heim at gleða gomlu mammu sína.

Eru Guds vegir ikki undurfullir? Ymsar gávur í túsundatali lógu lið um lið, og kortini fekk hesin maðurin júst ta gávuna,

sum var ætlað honum, tá ið tær vórðu býttar út. Mamma hansara hevur heilt vist verið ein biðjandi kona.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tað lítla, opna rúmið

*„Sonur mín, gev mær hjarta títt.“ Orðt. 23,26.*

Ein maður keypti sær eitt stórt putlispæl. Tað hevði einar 5000 prikkar. At enda eydnaðist honum at leggja alt spælið, men ein prikkur restaði í. Øll familjan hjálpti honum at leita, men til fánýtis. So tók hann lokið á eskjuni og vendi tí við. Ein lítil hvítur lepi var límaður innan í tí. Har stóð: „Ein prikkur restar í. Kom oman á verksmiðjuna eftir honum.“ Tað gjørdi maðurin, og ikki fyrr enn nú var myndin fullfíggjað, tá ið hann trýsti henda prikkin niður í tað opna rúmið.

Soleiðis er tað við okkum menniskjum. Gud hevur evnað og skapað okkum; men eitt lítið tómt rúm er inni í hjartanum. Tað rúmið er ætlað Jesusi, og ikki fyrr enn vit bjóða honum inn í hjartað, fellur tann síðsti prikkurin upp á pláss í lívi okkara, og myndin verður fullfíggjað. Mong menniskju leita hvíldarleys alla sína ævi eftir meiningini við lívinum og eftir friði. Um tey bjóða Jesusi inn í hjartað, flytur hann inn við friðinum og gleðini, og lívið fær av sonnum meining.

„Alt hevur hann gjørt lagaligt til sína tíð, eisini ævina hevur hann lagt í hjørtu teirra.“ (Præd. 3,11). „Sonur mín, gev mær hjarta títt.“ (Orðt. 23,26). Og soleiðis er tað, hjartað hvílir ikki, fyrr enn tað hvílir í honum. Tak ímóti Jesusi, tú, sum bara hevur hann á útsíðuni. Bjóða honum inn í hjartað sum Harra og Frelsara. Tað ræður um lív títt og tína framtíð, so legg einki í spottarans orð.

*Effie Campbell.*

# Týdningurin av bíbliulestri og bøn

*„Á, land, land, land! Hoyr orð Harrans!“ Jer. 22,29.*

Ein maður, sum arbeiðir í móttøkuni á Evangeliesentret, greiðir frá, hvussu stórur týdningurin av bíbliulestri og bøn er:

„Jesus segði, at menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, sum gongur út av Guds munni. Lesa vit ikki í Bíbliuni, fær sálin onga føði. Hon doyr! Her plaga tey at lesa einar tríggjar til fýra kapitlar dagliga. Tá ið tey soleiðis hava

fylt seg við Guds orði í einar tríggjar mánaðir, tá hendir nakað innan í teimum. Tey broytast. Friður fellur á tey, og trúgvin veksur fram.

Bøn hevur eisini stóran týdning. Starvsfólkið brúkar nógva tíð at biðja. Móttøkan er ikki tað lættasta staðið at arbeiða. Um nakar ófriður valdar, so er tað her, hann er. Tá ið nógv verður biðið, valdar friður og hugni undir lonini; men hevur starvsfólkið havt so nógv um at vera, at lítil tíð hevur verið til bøn, so merkist tað beinanvegin. Tá verða tað trupulleikar, ófriður og brotnir rútar.

Ja, avleiðingarnar, sum standast av tvørrandi bøn, tað vita vit alt um. Men tíbetur, royndirnar hava eisini lært okkum, hvat ið tú við Guds hjálp kanst útinna gjøgnum bøn. Eg skal nevna eitt dømi.

Vit høvdu ein mann inni her. Hann var úr Somalia. Hann var muslimur. Hann átti konu og børn í Somalia, men hann visti ikki, um tey vóru á lívi enn, tí hann hevði einki frætt frá teimum, og har hevur verið sovorðin ófriður.

Vit tosaðu við hann um Jesus. Jú, hann trúði, at Jesus hevði livað; men hann trúði ikki, at Jesus var nakað framúr serligt. Hann helt, at Jesus var ein stórur profetur millum so mangar aðrar.

Har vóru vit ikki samd. Vit trúðu, at Jesus var Guds sonur, og tá ið hann kom her niður á jørðina, so var tað ein partur av Gudi, sum kom niður til okkara. Vit tosaðu við hann og søgdu, at Jesus livir í dag, grøvin er tóm. Vit biðja til ein livandi Jesus. Tað er púra øvugt hjá muslimum, tí Muhammed er deyður. Hetta vildi hann ikki rættiliga ganga inn uppá.

Vit tosaðu so ikki meir um hetta við hann. Staðin fyri fóru øll starvsfólkini at biðja fyri honum, at Jesus mátti sýna seg fyri honum.

Og ein dag kom hann og segði, at nú vildi hann gerast kristin. Hann hevði av sonnum upplivað, at Jesus livir. Jesus hevði sýnt seg fyri honum og sagt: „Konan og børnini hjá tær eru á lívi í Somalia.“

„Ja, Jesus er sanniliga á lívi. Tað havi eg sæð við mínum egnu eygum. Hann er eisini Gud, tí hann hevur sæð inn í hjartadýpið á mær. Hann hevur sæð mítt hægsta ynski, at eg fegin vil fáa vissu fyri, um konan og børnini liva. Jesus sær alla

verðina, eisini Afrika, og hann kundi siga mær, at míni kæru eru í Somalia, og tey eru á lívi."

Hesin maður gjørdist kristin, og hann er bara eitt dømi um, hvat ið bøn kann útinna."

*Effie Campbell.*

# Ótti er ringasti fíggindi hjá trúnni

Ótti er sum ein torpedo, sum tekur alla trúgv burtur og beinir fyri henni. Óttin verður sum eitt sjálvuppfyllandi profeti um alt, vit óttast fyri.

„Tí at tað, sum eg óttist, rámar meg, tað, sum eg ræðist, hendir meg." Job 3,25.

Hetta er ein andaligur sannleiki. Tað, sum vit søkja, vil søkja okkum, og óttin vil altíð geva seg til kennar í kroppi okkara.

Einasta vápnið, sum vit kunnu berja óttan niður við, er trúgvin. Vit standa sum kristin altíð í einum andaligum bardaga, har djevulin brúkar einasta vápnið, hann hevur: Lygnina, sum skapar ótta.

Tí mugu vit venda okkum burtur frá lygnini og til Jesusar og fylla okkum við hansara kærleika: lesa Guds orð og endurtaka upp í saman øll hansara undurfullu lyfti til okkara.

„Ótti er ikki í kærleikanum, men hin fullkomni kærleikin rekur út óttan." 1. Jóh. 4,18.

*Effie Campbell* umsetti.

# Pengarnar ella lívið

Ja, hatta ljóðar sum eitt bankarán, men sannleikin er tann, at summi mugu geva lív sítt í tænastu fyri Gud, meðan onnur geva tað, sum neyðugt er av pengum at reka missión.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 29. jan. | **Tekstur:** | Mós. 12,37 + 40; 13, 21-22; 14, 1-31 | **Bíbliuorð:** | 2 Mós. 14,13b |
| 5. febr. | **Tekstur:** | 4 Mós. 21,4-9 og Jóh. 3,16-17 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 3,15 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 4** *12. februar 2023* **83. árg.**

# Listamálarin talar enn

Á ársmøtinum hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum 2008 hoyrdi eg hesa frásøgn:

Ein listamálari livdi í Týsklandi, meðan Luther var uppi á døgum. Hann skuldi mála eina altartalvu til eina lutherska kirkju í Weimar, ið liggur í Miðtýsklandi.

Í einum horni málaði hann Jóhannes doyparan, ið stendur og peikar upp á Guds lambið, sum ber burtur allar heimsins syndir. (Jóh. 1,29) Jesus var Guds offurlamb.

Síðani málaði hann Luther, sum stendur og peikar á stongina við koparorminum, og hann peikar eisini upp á Jesus á krossinum. Í 4. Mós. 21,9 lesa vit: „Móses gjørdi orm av kopari og setti hann upp á stong. Og hvørja ferð maður var bitin av ormi, og hann leit at koparorminum, varð hann verandi á lívi.“ Koparormurin var ein fyrimynd upp á Jesus. Í Jóh. 3,14–15 stendur: „Eins og Móses hevjaði upp ormin í oyðimørkini, soleiðis eigur menniskjusonurin at verða upphevjaður til tess at ein og hvør, sum trýr, skal hava ævigt lív í honum.“

So málaði listamálarin seg sjálvan. Hann málaði eina ljósrípu, sum gekk frá krossinum og beint niður á høvdið á sær. Henda rípan skuldi ímynda Jesu blóð, sum reinsar frá allari synd, so vit gerast hvítari enn kavi. (1. Jóh. 1,7 og Sálm. 51,9).

Hetta er ein undurfull altartalva. Alt evangeliið stendur so skilligt og greitt á henni, og við hesum verki hevur listamálarin prædikað í 500 ár.

*Effie Campbell.*

# Fagri, nýggi heimur?

Ein ókendur rithøvundur greiddi einaferð soleiðis frá verð okkara:

> *„Vit hava størri hús, men minni familjur.*
> *Fleiri hentleikar, men minni tíð.*
> *Meira vitan, men minni dømievni*
> *Fleiri serfrøðingar, men størri trupulleikar.*

Vit roykja og drekka ov nógv, flenna ov lítið, koyra ov skjótt, gerast skjótt uppøst, fara ov seint í song, fara móð uppaftur, lesa ov lítið, hyggja ov nógv í sjónvarp, biðja sjáldan.

- Vit vaksa um okkara ognir, men minka um okkara virði.
- Vit vita, hvussu vit skulu tjena til lívsins uppihald, men ikki hvussu vit skulu liva.
- Vit hava vaksið um miðallivialdurin, men vit liva ikki tey eyka árini.
- Vit eru før fyri at fara til mánan, men ikki longur til dyrnar hjá grannanum.
- Vit hava hertikið himnarúmdina, men ikki okkara egna tómrúm.
- Vit kunnu klúgva atomir, men ikki okkara egnu fordómar.

Hetta er tíðin, har tað er týdningarmiklari at hava okkurt í sýnisglugganum enn á vørugoymsluni.

Har tøknin sum ein hvirluvindur kann spreiða ein tekst sum henda um allan heimin.

**Og har tú sleppur at velja at:** „Broyta lívið – ella strika tekstin.“

*Keldan til henda tekst: ERF, Týskland.*

# Fagri, nýggi heimur? Ein glataður heimur?

Er nøkur vón? Ja, tí Jesus varð føddur inn í henda heim, og hann kemur til okkara og bjóðar okkum at byrja av nýggjum. At byrja av nýggjum við honum, við okkum sjálvum, við okkara medmenniskjum, við okkara verð. Vend um og tak ímóti Jesusi. Tá finnur tú lívið og verður ríkisborgari í Himli.

Tá er tað, eins og Jesus salvar tíni eygu, og tú sært tað, sum tú ikki hevur sæð fyrr: Mitt í einum glataðum heimi verður okkurt brádliga nýtt og fínt.

*„NoreaNyt“ – Effie Campbell umsetti.*

# Ein avtala við Harran

Eitt kvøldið endaði ein maður sangløtuna í Blákross Kaféini. Hann knýtti ein stuttan vitnisburð upp í ta taluna:

Tað er soleiðis vorðið, at vit umgangast mong menniskju hvønn dag. Mong orð verða havd á lofti, og sum trúgvandi kann sálin blíva særd av mongum ótespiligum, sum sagt verður. Fyri nógvum árum síðani gjørdi eg eina avtalu við Harran. Eg segði: „Harri, tá ið tað er mín túrur til at tala at, tá ið tú vilt hava meg at siga eitt orð, tá mást tú við Heilaga Andanum tala klárt og týðiliga við meg og siga mær tað.“ Og tað hevur Harrin gjørt tvær ferðir. Fyrru ferðina var stutt eftir, at eg hevði biðið hasa bønina. Seinnu ferðina var fyri stuttum.

Vit vóru nógvir mans, sum vóru staddir inni í einum betong bygningi. Tá kom ein ungur maður brestandi inn. „Eg havi lisið á Facebook, at vísindamenninir, sum grava, hava funnið eini hús í Ísrael. Har liggur líkið av Jesusi. Hann hevði bæði konu og børn,“ segði hann so uppgløddur.

Tá hoyrdi eg týðiliga Harrans rødd siga: „Nú er tað tín túrur at tala at!“

„Nei,“ segði eg, „hasum trúgvi eg ikki!“

„Hví?“ spurdi hann. „Tað eru vísindamenn, sum siga hetta.“

„Tí, Bíblian er Guds orð. Har talar Harrin, og hann sigur mær, at Jesus doyði á krossinum fyri mína synd, og hann reis uppaftur fyri mína rættvísgering. Grøvin er tóm, tí hann er í himlinum í dag!“

Har gjørdist so pinnastilt. Eingin av hesum mongu monnum talaði eitt orð, heldur ikki hin ungi.

*Effie Campbell.*

# Sannleikin

Ert tú ein, sum leitar eftir sannleikanum? Um so er, so finnur tú hann í Nýggja Testamenti.

Bíblian er ein ógvuliga óvanlig bók. Hon er einasta bókin, har rithøvundurin talar til tín persónliga, meðan tú lesur hana. Tá ið tú kemur til 14. kapittul í Jóhannesar evangelium

og lesur vers 6, stendur: „Jesus sigur við hann: Eg eri vegurin, sannleikin og lívið.“

„Eg eri vegurin,“ stóð skrivað. Alt lívið hevur tú kanska leitað eftir sannleikanum og hugsað um hann sum okkurt ópersónligt og abstrakt. Nú sært tú, at sannleikin er ein persónur, og persónurin eitur Jesus Kristus. Í Jesusi Kristi finnur tú tað, sum tú so leingi hevur leitað eftir!

Gud skapaði menniskjuni, fyri at tey skuldu kenna hann og gleða seg yvir lívið. Men vit syndaðu móti Gudi og mistu sambandið við hann. Tí sendi Gud son sín, Jesus Kristus, fyri at hann skuldi blíva menniskja og doyggja sum ein brotsmaður, og á tann hátt gjalda prísin fyri syndir okkara. Jesus er vegurin. Øll tey, sum seta sítt álit á Jesus, fáa syndirnar fyrigivnar og gleða seg yvir felagsskapin við Gud.

Gud vildi jú frá upphavi hava felagsskap við okkum í ævir. Men syndir okkara standa í vegin. Gud læt son sín sum loysigjald fyri syndir okkara. Tí mugu vit venda við og venda syndini bakið og taka ímóti Jesusi sum harra í lívi okkara. Tá eiga vit lyfti um æviga frelsu, og ein gleði og ein friður, sum ber av øllum viti, streymar inn í hjarta okkara.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Fíggindin vendir sínum álopum móti heimunum, tí familjan stendur Guds hjarta næst. Fíggindin fær menn at gevast at elska konur sínar, hann er orsøkin til friðloysi og upployising, og hann fær børn og foreldur at hata hvørt annað.

*e.c. ums.*

---

Tá ið tú ert vorðið eitt Guds barn, fert tú heilt natúrliga at fáa ein vaksandi áhuga fyri Bíbliuni. Hon er jú boðskapurin til tín frá tínum himmalska Faðir.

*e.c. ums.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12. febr. | **Tekstur:** | 5 Mós. 26,1-11 | **Bíbliuorð:** | 5 Mós. 26,11 |
| 19. febr. | **Tekstur:** | Matt. 6,17-18 og 1 Sám. 16,4-13 | **Bíbliuorð:** | 1 Sám. 16,7c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74